DAGSINS MEINING

Raðfesting og fíggjarlóg

Landskassin er eftir øllum at døma í nógv verri standi, enn hildið var undan valinum. Skattainntøkurnar eru kanska einar tvey hundrað milliónir lægri enn mett varð fyri minni enn einum ári síðani. Harafturat forsømdi undanfarna samgonga at gera nakað við útreiðslustøðið, hóast blokkurin var niðurskorðin við 366 milliónum um árið.

Fyri samgonguna, sum nú situr, merkja fallandi skattainntøkurnar, at hon má endurskoða tað, ið farið var út til val uppá, tí fortreytirnar eru munandi verri, enn tosað var um undan valið.

Vónandi fer samgongan ikki at spara uppá sama máta, sum undanfarni landstýrismaðurin í fíggjarmálum skeyt upp, har man skar eitt prosent av allastaðni um ein kamb. Hetta er ikki skilagóður máti at spara uppá, tí endin verður, at alt riggar illa, tí eingin hevur nokk. Eisini eru sparingar um ein kamb ein ov lættur vegur út hjá politikarum, tí tað sleppur teimum undan at raðfesta. Hetta eiga teir ikki at sleppa. Teirra uppgáva er at raðfesta, so at skattgjaldarans peningur verður brúktur best møguligt til tað, ið skattgjaldarin vil, at peningurin skal fara til. Hetta merkir, at politikarar eiga at seta eina raðfesting upp, har tey týdningarmestu málini standa ovast, meðan tey ting, ið kunnu verða góð at hava, men ikki eru neyðug standa niðast, og kunnu fremjast, tá pensionistar, sjúk, avlamin, skúlaungdómur o.s.fr. hava fingið sítt. Tað, sum er neyðugt, má fram um tað, ið er gott at hava.

Hetta tekur okkum til politiska kjakið seinastu tíðina, har andstøðuflokkurin, ið hevur havt ábyrgd av markantu undirbudgetteringini hvørt ár seinastu 6 árini, setir kostnaðarmikil uppskot fram, uttan at fortelja, hvussu hesi skulu figgjast.

Eitt dømi er listaskúlin, og helst er breið semja, um at ein slíkur skal gerast, tá ráðini eru til tað. Spurningurin er bara, um hesi ráðini eru til staðar í dag. Hvussu ætlar Tjóðveldsiflokkurin at figgja ein slíkan í verandi løtu, har tað tykist trupult at figgja tann dagliga raksturin av landinum, uttan lántøku? Vit spyrja bara!

Alt ov ofta verða málini diskuterað sum einkultmál, tá tey verða løgd fyri tingið. Tí fær man alt ov ofta eitt einsporað kjak, har tingini gerast svørt ella hvít. Um ein tinglimur fær settan spurningin, um hesin vil hava ein listaskúla í Føroyum, so svarar tinglimurin helst ja, tí hvør unnir ikki skapandi listini alt tað besta. Fær sami tinglimur settan spurningin, um vit skulu hava henda listaskúla ella, um vit fyri somu pengar skulu avskaffa bíðilistar í sjúkrahúsverkinum og innføra økisterapi, so verður svarið helst ikki so einfalt. Vit siga ikki, at hetta er reella støðan í dag, men hetta er ein roynd at lýsa, hvussu ein heildarmynd við einari heildarraðfesting má verða partur av politiska kjakinum, tí hetta er tann beiski veruleikin, ið politikarar mugu brynja seg til komandi árini. Politikarar í samgongu og í andstøðu.

Tað er gott, at Tjóðveldisflokkurin heldur áfram við at vísa á vegir fram til dømis innan mentanarøkið, men flokkurin skyldar eisini at fortelja, hvussu hetta skal gjaldast. Blokkurin, ið sambært somu tjóðveldisfólkum skapti "kunstiga vælferð" er skorin nógv, og tí verður minni til alt tað, ið ikki er strangt neyðugt, men bert gott at hava.At reka konstruktivan andstøðupolitikk er eisini at siga frá, hvaðani pengarnir skulu koma til at figgja tey ymsu málini.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Stýrir Grønland føroysku fiskivinnuumsitingini?

Viga grønlendsk/donsk áhugamál tyngri hjá landsstýrinum enn kreppan í føroyska rækjuflotanum

Jákup Egholm Hansen

Seinastu nógvu árini hava føroyskir politikarar rópt um kapp um studningsfría vinnu, og at teirra uppgáva er at skapa karmar fyri sjálvberandi vinnu. Alt gott um tað. Men hvat eru tað so fyri karmar sum politikarnir hava útvega kreppurakta rækjuflotanum ?. Fyri fiskiskap kann "karmar" neyvan verða annað enn kvotur ella veiðumøguleikar. Og her er ringt at fáa eyga á nakrar víðkaðar karmar, tí meðan rækjuveiða í Norðuratlantshavinum síðani 1970 er vaksin við 1600% úr 25.000 tonsum til uml. 400.000 tons nú, so eru rættindini hjá føroysku rækjuskipunum heldur minkaði enn vaksin hesi 30 árini.

Hetta er ein stór orsøk til, at rækjuflotin er í eini so truplari støðu sum hann er, og tí er heldur ikki ov nógv kravt, at núverandi politikarar við ymiskum tiltøkum av álvara tryggja, at rækjuflotin kann fóta sær aftur.

Grønlendsk smáligheit

Men hetta gerst ikki, um landsstýrið letur sín fiskivinnupolitikk á m.a. NAFO og NEAFC-økinum stýra av Grønlandi.

Føroysk skip hava við tógvi stríð og fyri ein høgan pris vunni sær søgulig rættindi til rækjukvotu á Grand Bank. Men hóast hetta økið einans er opið fyri rækjuveiðu 6 1/2 mánaða um árið, so eru longu 3 mánaðir farnir uttan at føroysku skipini eru sloppin í gongd. Og sambært landsstýrinum er orsøkin at Grønland forðar fyri hesum. Hetta landið, sum hevur yvir 100.000 tons av rækjukvotu í egnum sjógvi, leggur forðingar í vegin fyri at føroyingar kunnu fiska síni uml. 1.200 tons, tí teir vilja hava eini 400 tons burturav. Ófatuligt at landsstýrið og danska uttanríkismálaráðið vilja latað slíka grønlendska smáligheit um seg ganga, men tað er júst tað sum hendir. Hevði Grønland so liva upp til fiskiveiðuavtaluna millum Grønland og Føroyar um, at føroysk skip skulu kunna keypa rækjukvotur frá grønlendskum skipum, so kundi ein kanska tosa um eitt slag av javnvág, men tað ger Grønland ikki. Slíkar avtalur verða politiskt forðaðar í Grønlandi. Teir velja heldur at selja komandi ES-limum úr Baltalondum hesar kvotur. Og óndar tungur vilja verða við, at teir verða væl stuðlaðir av einstøkum reyputum føroyskum yvirmonnum við grønlendskum skipum.

At Grønland eisini leggur forðingar fyri føroysk áhugamál í NEAFC átti at fingið bæði føroyskar og danskar myndugleikar at raknað við.

Grønland forðar føroyskum skipum

Og ikki nóg mikið við tað. Tey føroysku skip sum av sínum eintingum royna at víðka um sínar karmar við at keypa sær kvotur frá øðrum londum á NAFO-økinum, fáa noktandi svar frá landsstýrinum. Grundgevingin er, at Grønland og uttanríkismálaráðið eru ímóti, og at hetta brýtir við princippir hjá myndugleikunum í Danmark, Grønlandi og Føroyum. Men hvat í allari víðu verð skulu vit brúka princippir um rækjuveiðu á NAFO-økinum til, tá ongi skip verða eftir ?. Og tað verður endin um landsstýrið ikki tekur annað skinn um bak. Men tað passar ivaleyst sum fótur í hosu fyri grønlendsku rækjuvinnuna, er kanska júst tað teir vóna.

Floyals-handskarnar av

Tíðin er fyri langari tíð síðani komin, har føroyskir myndugleikar taka floyals-handskarnar av í millumlanda fiskiveiðumálum, og sjálvir seta nøkur mál út í kortið, eins og íslendingar og norðmenn gera, uttan mun til hvat Grønland, Danmark, Canada og aðrir siga. Tað er niðurbrótandi fyri vinnuna at vita sær, at okkara landsstýrið tekur donsk og grønlendsk áhugamál framum karmar fyri kreppuraktu rækjuskipini

Ein embætismaður í landsstýrinum segði einaferð, at vit máttu royna at seta okkum inní hvussu grønlendingar hugsa í málinum um kvotabýtið á Grand Bank. Tað kann væl verða at vit eisini skulu gera tað, men tað er uppá tíðina, at okkara egna landsstýrið eisini setir seg inní hvussu føroyska rækjuvinnan hugsar og hevur tørv á, tí tað má alt annað líka hava stórri týdning enn hvat grønlendingar hugsað.

VARPIÐ
Skráir og ummælir 16 síður Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Fimleikaframsýning

Havfrýr í skipsvraki. Myndin er frá Fimleikafagnaðinum í Norðurlandahúsinum í november 2003, har Støkk vann fagnaðin

TÍÐINDASKRIV

Komandi vikuskifti hevur Støkk árliga fimleikaframsýning í ítróttarhøllini í Runavík. Leygardagin 27. mars byrjar framsýningin klokkan 15.00 og sunnudagin 28 mars klokkan 16.00.

Øll liðini hjá felagnum eru við til framsýningarnar báðar dagarnar, tó verða merkir og íðnisprógv handaði sunnudagin.

Framsýningarnar eru mettar at vara umleið 2 1/2 tíma fyrra dagin og 3 tímar seinna dagin.

Eins og undanfarin ár hevur felagið nógvan fjølbroyttan fimleik at vísa fram, eitt nú móðir og barn, børn 5-6 ár, vanligu liðini frá 1.-10. flokk, ungar kvinnur, aerobic, reiðskapslið, stór-kappingarlið og blandað lið við kvinnum og monnum.

Við í framsýningini verður eisini afturvendandi tiltakið við grýlum. Eisini skipar felagið fyri páskaeggjatombola og kaffisølu í gongini í ítróttarhøllini báðar dagarnar.

Atgongumerkjasølan byrjar 1 tíma áðrenn framsýningina. Kostnaðurin er 60 kr. fyri vaksin og 20 kr. fyri børn.

VIÐMERKINGAR

Hvar skal krossurin setast?

Petur S Johannesen

Eg vil fyrst byrja við at spyrja leiðsluna í Sambandsflókkinum, hvat teir virða tær 800-900 stemmurnar, sum flokkurin fer í Suðuri?

Eg stilli hendan spurning, tí eg vil gjarna vita, hví Sambandsveljarin í Suðri, saman við tingmanninum hjá okkum hava fingið eina so ljóta viðferð frá einum stórum parti av Sambandsleiðsluni norðanfjørðs.

At tað eru gjørdar avtalur millum Havnina og Klaksvík er ongin ivi um. Klaksvíkin fekk fiskimálaráðharran, sum annars var tillutaður okkum í Suðri, og fyri at tað skuldi kunna lata seg gera, mátti okkara maður so lata sít lív.

Nú Klaksvíkin hevði fingið landstýrissessin hjá Johan Dahl, skuldi Havnin nú hava formannin. Hetta skuldi gerast so stilt og róligt, sum møguligt. Tí sum Kaj Leo jú hevur útalað: Sambandsflókkurin tolir ikki meira ringa reklamu, men er tað ikki júst Kaj Leo og hansara menn, sum hava givið Sambandsflókkinum hesa ringu reklamu við at jagstra og forfylga okkara tingmanni, Johan Dahl, og tikið alla meiningina úr orðinum, Samband, í hvussu er í eygunum hjá sambandsveljaranum í Suðuroy.

Nei eitt er so heilt sikkurt, vit koma aldrin at gloyma Sambandsflokkin fyri hesa ljótu gerð, sum nú er gjørd .Tað skuldi ganga 35 ár innan vit í Suðri fingu tillutað ein Landstýrissess aftur frá Sambandsflokkinum, og at hann var okkum illa untur, ja tað sígga vit nú.

Tí heiti eg á allar sambandsveljarar úr Suðri. Gloymið ikki hetta aftur. Tíðin er helst komin, at vit nú munnu byrja at hugsa okkum beturi um, tá vit skulu seta krossurin næstu ferð. Tí eitt er sikkurt, vit eru ikki ein partur av tí Sambandsflokki, sum er norðanfyri, tað gjørdu teir klárt við at stinga knívin í ryggin á tí manni (Johan Dahl), sum vit í Suðri valdi at senda norður til Havnar á Ting.

Men eg rokni nú ikki við, at søgan endar her. Tí sum danin sigur: »Den der graver en grav til en anden, falder ofte selv i den«.

Náttúrugransking og -lesnaður?

Hans Birgir Hansen

Tað er frá Danmarks elstu fyritøku innan náttúrumedisin, eg havi tvey bind, focus á náttúrumedisin, og eg havi sjúkraskrásetin og vøruyvirlit, frá A til Ø, og kunningarbløð! Fyritøkan hevur granskingarstovu, starvsfólk og framleiðsluvirksemi av náttúrumedisini, ið selt verður á danska heimamarknaðinum, ið eisini fæst til keyps í Havn, undantikið apotekið! Eg kann standa inni fyri tí náttúrumedisini, eg sjálvur eri brúkari av, ið ein kann viðmæla fólki at royna, ið hava vælferðarsjúkur, og kunnu vinna á sínum heilsutrupulleikum.

Villleiðandi kunning/ upplýsing?

Starvsfólkini innan almanna-, heilsu, sjúkrahús- og apoteksverkini, og heimarøktar- og kommunulæknaskipanir geva tilvitað villleiðandi kunning/upplýsing til viðskiftafólk í dag. Vit kunnu spara 100 tals mill. kr. á hvørjum ári við at bjóða øllum føroyingum, ið eru misnýtarar, fríska ernering/ føðsluevni/kropsføði/kosttilskot/motiónstúrar kring alt landið! Flestu øll ættarlið, stættir, frá børnum til fólkapensionistar, eru misnýtarar, og primitivu viðgerðarmøguleikarnir eru ikki nøktandi, og tá ið øll skulu uppihalda øllum fakbólkum, stættum!

Frískari og opið samfelag?

Tað gongur støðugt fram á at skapa eitt frískari & opið samfelag, hvørs øll tabuevnir skulu gerast søga, tá øll skul fáa livað og virkað á egnan hátt við at bróta tann ónda sirkulin! Vit kunnu spara nógvar felagsskapir, fyritøkur, stovnar, virkir, myndugleikar, vøldir, felagsskapir, klubbar, eru misnýtarar, ið kunnu greiða frá lívi sínum og rúsevnisumhvørvi!

Vegurin til frískari lív?

Tað er hvat ið ein fæst við at kunna um í lesarabrøvum og úti millum manna, har fólk fylgja eins ráðum, ið eru uppgivin av læknaautoritetum, ið leita sær røttu kunning, upplýsing, í dag! Vit kunnu niðurseta deyðiligheitina í øllum Føroyum í dag, og fyribyrgja og lekja vælferðarsjúkur, ið ein fæst við at granska og lesa upprunan til heima við hús!

Vitja heimasíðu
www.natur-drogeriet.dk